STARVSMANNAFELAGIÐ

Tórshavn 03. september 2018

**Samferslumálaráðið**

***Att. Astrid Reinert Øregaard***

**Viðmerkingar til uppskot at broyta Arbeiðsskaðatryggingarlógina**
Niðanfyri eru viðmerkingarnar hjá Starvsmannafelagnum til Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um trygging móti avleiðingnum av arbeiðsskaða (Arbeiðsskaðatryggingarlógin), dagf. 9. august 2018, sum er sent okkum til hoyringar.

***Almennar viðmerkingar***
Starvsmannafelagið tekur undir við, at umsitingin av uppgávunum undir Arbeiðstryggingarlógini nú verða lagdar til Arbeiðs- og Brunaeftirlitið. Við hesum meta vit, at skipanin fer at líkjast skipanum í øðrum londum, har økir sum arbeiðsumhvørvi og arbeiðsskaðar/ vinnusjúkur liggja saman í einum og sama stovni. Vit halda, at uppgávurnar hoyra natúrliga saman.

Verandi skipan er fløkt og trupul at skilja hjá vanligum fólki. Við tað, at ymiskar skipanir eru við fráboðanum og einki formaliserað samstarv hevur verið millum Vanlukkutryggingarráðið og Arbeiðs- og Brunaeftirlitið, er støðugur vandi fyri, at fráboðanarfreistir ikki vera hildnar og starvsfólk, ið fáa skaða ella vera sjúk av sínum arbeiði, detta niðurímillum og missa síni rættindi.

Fyri trygd og rættindi hjá starvsfólkunum skuldi ætlaða broytingin avgjørt verið ein fyrimunur.

Vanlukkutryggingarráðið hevur livað sítt stilla lív, og tað er helst avmarkað hvat fólk vita um hesa skipan. Tað er okkara vón, at upplýsingin um rættindi eftir Arbeiðskaðatryggingarlógini verður betri og sjónligari, tá ið uppgávurnar verða lagdar til Arbeiðs- og Brunaeftirlitið.

Viðvíkjandi ítøkiliga innihaldinum, hevur felagið hesar viðmerkingar til lógaruppskotið:

***Undirheitið á lógini***
Vit eru samd í, at undirheitið á lógini eigur at vera broytt, við tað, at talan í roynd og veru er um, at uppgávurnar, ið liggja undir Vanlukkutryggingarráðnum verða fluttar til Arbeiðs- og Brunaeftirlitið, og at Vanlukkutryggingarráðið verður tikið av. Hettar eigur, at framganga av undirheitinum til lógina (í klombrum), og í samsvari við hetta eigur orðið *'samanlegging'* at verða strikað, har tað kemur fyri, t.d. undir pkt. 1.1 og 1.4.

***Avleiðingar, kap. 2 - starvsfólkaviðurskifti***
Undir kap. 2. Avleiðingar av uppskotinum er einki nevnt um starvsfólkaviðurskiftini. Sum felagið skilir, er talan um at flyta 2 starvsfólk, sum í dag eru staðsett hjá Føroya Rætti til Arbeiðs- og Brunaeftirlitið. Tey eru sett eftir sáttmála við HK, har tey eisini eru limir.

Lógaruppskotið má nevna hvussu hendan umskipanin fer at ávirka starvsfólkaviðurskiftini, á hvørjum rættarligum grundarlagið starvsfólkini verða flutt, setanarmyndugleiki, sáttmálaviðurskift o.s.fr.

J. H. Schrøtersgøta 9 • Postsmoga 165 • FR-110 Tórshavn • Tlf. 298 614868 • Fax 298 311092 •
t-post: starvsmannafelag@starvsmannafelag.fo • Heimasíða: www.starvsmannafelag.fo

Vit taka eisini sum givið, at setanarmyndugleikin fer at seta seg í samband við starvsfólkinini, ið verða flutt og kunnar tey um støðuna og rættindi, so sum tey hava krav um.

***Viðv. nr. 7 og 8 í lógaruppskotinum***
Hendan broyting viðvíkur málsviðgerðini, tá ið uppgávurnar verða fluttar frá Vanlukkutryggingarráðnum til Arbeiðs- og Brunaeftirlitið og ein tillagan av §§ 26 og 27 í galdandi Arbeiðsskaðatryggingarlóg.

Umráðandi er at ansa eftir, at fakliga dygdin í málsviðgerðini hjá Vanlukkutryggingarráðnum ikki versnar, men at broytingin heldur fer at gera fakligu dygdina enn betri.

Vanlukkutryggingarráðið er við lóg mannað við einum dómara frá Føroya Rætti (sorinskrivarin) og 4 nevndarlimum. Ein av nevndarlimunum skal vera útbúgvin lækni og ráðið skal hava skrivara, sum hevur lokið løgfrøðiligt embætisprógv ella annað viðkomandi prógv frá hægri lærustovni, sbr. § 27, stk. 1 og 3. Talan er við øðrum orðum um nevnd við hollum fakligum førleika og stovn, sum hevur vunnið sær royndir á økinum gjøgnum nógv ár.

Smbrt. lógaruppskotinum er ætlanin í staðin at skipa ein serstaka arbeiðsskaðadeild á Arbeiðs- og Brunaeftirlitinum, sum skal taka sær av uppgávununum, sum higartil hava ligið hjá Vanlukkutryggingarráðnum. Deildin verður mannað við einum ella tveimum skrivstovufólkum og einum løgfrøðingini/fulltrúa.

Starvsmannafelagið hevur ikki førleika, at meta um hvørjir fakligir førleikar eru teir røttu til eina arbeiðsskaðadeild og um neyðugt t.d. er at hava lækna fast knýttan at deildini. Sum skilst hava bæði Arbeiðs- og Brunaeftirlitið og Vanlukkutryggingarráðið leingi havt tætt samstarv við Deildina fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu, tá metingar skulu gerast av málum. Vit kunnu tó bara staðfesta, at Vanlukkutryggingarráðið harumframt hevur ein lækna formliga knýttan av sær, sbr. § 27, stk. 1. Tit vera biðin um at taka støðu til hvørt tað fyri dygdina í málsviðgerðini kann vera ein fyrimunur, at nýggja arbeiðsskaðadeildin eisini hevur ein fastan lækna í starvi ella í minsta lagi fastan lækna knýttan formliga at sær.

Eisini mæla vit til at tryggja verður, at tær fakligu royndir, sum Vanlukkutryggingarráðið hevur vunnið sær gjøgnum árini ikki fara fyri skeyti, men verða gagnnýttar í nýggju Arbeiðsskaðadeildini.

***Kæruforum, kap. 7 í Arbeiðsskaðatryggingarlógini***
Av lógaruppskotinum framgongur, at eingin broyting verður viðvíkjandi kærumøguleikanum.

Smbrt. kap. 7 í Arbeiðsskaðatryggingarlógini er tað *Ankestyrelsen*, ið er kæruforum, og við *Ankestyrelse er at skylja ein yvirskipaður danskur fyrisitingarstovnur, sum viðgerð avgerðir hjá einum lægri fyrisitingarstovni*, sbr. § 35 í Arbeiðsskaðatryggingarlógini.

Tað er skilligt, at hendan skipan hevur verið galdandi, meðan umsitingin av Vanlukkutryggingarráðnun hevur ligið hjá Føroya Rætti. Verða uppgávurnar hjá Vanlukkutryggingarráðnum lagdar undir Arbeiðs- og Brunaeftirlitið, verður virksemið partur av hesum stovni. Spurningurin er, um kæruskipanin tá ikki av røttum átti at ligið hjá einum yvirskipaðum føroyskum fyrisitingarmyndugleika ella Føroya Kærustovni, eins og kæra eftir Arbeiðsumhvørvislógini og Tilbúgvingarlógini, sum Arbeiðs- og Brunaeftirlitið eisini umsitur.

Av lógarforarbeiðinum til Arbeiðsskaðatryggingarlógina sæst, at grundin til, at danskur kærumyndugleiki er brúktur, hevur verið at tryggja holla fakliga viðgerð av kærum og harvið rættartrygdin hjá teimum tryggjaðu.

Felagið heldur, at støða eigur at verða tikin til, um tíðin ikki er búgvin til at kærur verða viðgjørdar av yvirskipaðum føroyskum myndugleika. Tó mælir felagið staðiliga frá, at nøkur broyting verður gjørt viðvíkjandi kæruforum, um ivi er um, hvørt tað er forsvarligt í mun til rættartrygdina hjá teimum tryggjaðu.

***Tey fráboðanarskyldugu***
Lógaruppskotið leggur upp til, at § 24, stk. 3 verður broytt, so at tað verður soljóðandi:

*Læknar og tannlæknar hava eisini skyldu at boða Arbeiðs- og Brunaeftirlitinum og øðrum avvarandi eftirlitsstovnum frá øllum tilburðum, sum teir í yrki sínum gerast varugir við kunnu vera vinnusjúkur sbrt. § 10.*

Uppskotið til lógarbroyting er, at orðið *'Vanlukkutryggingarráðnum'* verður skift út við *'Arbeiðs- og Brunaeftirlitinum.'*

Sum lógin er orðað í dag, er sannlíkt, at við *'aðrir avvarandi eftirlitsstovnar'* verður fyrst og fremst sipað til júst Arbeiðs- og Brunaeftirlitið. Tískil kann tað skapa iva fyri brúkaran av lógini hvørjir hesir 'aðrir avvarandi eftirlitsstovnar' eru, tá ið Arbeiðs- og Brunaeftirlitið ikki verður talt við.

Biðið verður um, at hettar verður nágreinað, við tað, at tað er sera týdningarmikið, at reglurnar um fráboðan, sum eru so sentralar í lógini, eru púra greiðar.

Viðvíkjandi fráboðanarskylduni í § 24 mælir felagið annars til, at greinin verður broytt, so at hon beinleiðis staðfestir, at arbeiðsgevarar og landið eisini hava skyldu at boða Arbeiðs- og Brunaeftirlitinum frá vinnusjúkum, sbr. § 10 í lógini. Eftir galdandi lóg hava arbeiðsgevari og landið fráboðanarskyldu fyri vanlukkur, sbr. § 24, stk. 1 í lógini, meðan bert læknar og tannlæknar hava fráboðanarskyldu fyri vinnusjúkur, sbr. § 24. stk. 3. Hettar er ikki nóg trygt.

Starvsmannafelagið veit meira enn eitt dømi um, at starvsfólk hava verið sjúkrameldað og arbeiðsgevarin visti, at talan var um møguliga vinnusjúku. Í hesum førum var sjúkan ikki fráboðað Vanlukkutryggingarráðnum, hóast starvsfólkini høvdu verið hjá lækna. Um bæði lækni, tannlækni og arbeiðsgevari/landið hava skyldu at boða frá vinnusjúkum minkar vandin fyri slíkum feilum, sum í ringasta føri kann hava við sær, at starvsfólk missa síni lógarfestu rættindi.

Vinarliga

**Súni Selfoss, formaður**
**Starvsmannafelagið**

J. H. Schrøtersgøta 9 • Postsmoga 165 • FR-110 Tórshavn • Tlf. +298 14868 • Fax +298 11092